90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Leo Poulsen

# SJÚRÐUR SKAALE

# Esmar Eysturoy er nokk sjálvironi



**SJÚRÐUR SKAALE** HEVUR **MEGINPARTIN** AV **TÍÐ** SÍNI VERIÐ EITT **KENT** NAVN MILLUM **FØROYINGAR**. FYRST SUM **ANNAR** PARTURIN AV **PIPAR & SALT**, MEN SEINASTU **ÁRINI** LÍKA NÓGV SUM **EIN** AV **TEIMUM 33**, SUM MANNA **LØGTINGIÐ**. RÆSTUR FISKUR, **GARNATÁLG** OG **SPIK** ER MILLUM **LÍVRÆTTIRNAR** HJÁ **SKEMTARANUM** OG **TINGMANNINUM**, SUM **IKKI** ROKNAR VIÐ AT VERA Í **POLITIKKI** UM 10 ÁR

## Hvat fekk teg at fara upp í politikk?

Lutvíst áhugi og lutvíst áheitanir frá fólki.

**Hvussu var tað at gerast kendur við Pipar & Salt?**
Tað er øgiliga stuttligt at gera nakað, sum verður væl móttikið, so tey fyrstu P&S árini vóru herlig.

**Hvussu funnu tú og Jákup Veihe saman?**
Tað var nokk gjøgnum kabarettirnar í sjónleikarhúsinum fyri umleið 20 árum síðani.

**Hvar kom hugskotið til Esmar Eysturoy frá?**
Vit vóru báðir lesandi tá, so tað var nokk sjálvironi.

**Hvør er besta ferðin tú hevur gjørt?**
Havi gjørt nógvar sera góðar, men tann sum hevur ávirkað meg og givið mær mest var nokk tá eg var eitt gott ár í Suðuramerika sum ungur.

## Ferðast tú nógv í egnum landi?

Eitt sindur, ja, men tað kundi verið meira. Eg geri kortini nógvar dagstúrar í fjøllini.

**Hevur tú húsdjór?**
Nope.

**Hvat er besti filmur, tú hevur sæð?**
*I'll make him an offer he can't refuse :)*
Godfather verður nokk aldrin tikin.

**Hvør bók liggur á náttborðinum?**
Har liggja altíð fleiri. Men víkingaskaldsøgan Ormur Reyði liggur ovast. Ótrúliga stuttlig – og framúrskarandi væl umsett av Bjarna Niclasen. Nøkur hugskot til handritið til tann garrvilla Torgrím og mammu hansara úr Pipar & Salt stava frá Ormi Reyða.

## Hvør er tín lívrættur?

Tað er so nógv. Men ræstur fiskur, garnatálg og spik slær ikki falskar mentir.

## Verður tú framvegis í politikki um 10 ár?

Nei, tað rokni eg ikki við.